## Lisbeth spyr um fjølmiðla-ábyrgd

**FJØLMIÐLAR**
*Ingi Rasmussen*

Lisbeth L. Petersen, fólkatingskvinna, hevur á Fólkatingi sett danska løgmálaráðharranum Lene Espersen fyrispurning um fjølmiðla-ábyrgd.

Hon vil hava Lene Espersen at greiða sær frá, hvat slag av avtalu varð gjørd millum hana og Høgna Hoydal landsstýrismann tann 3. februar, tá avrátt var, at føroyingar kunnu yvirtaka ábyrgdina av fjølmiðlunum.

Orsøkin til fyrispurningin er, at Sambandsflokkurin í Føroyum hevur skotið upp, at føroyingar seta donsku lógina í gildi, meðan bíðað verður eftir, at føroyingar sjálvir hava fingið ábyrgdina av fjølmiðlunum á føroyskar hendur og hava smíðað sína egnu lóg.

Lisbeth L. Petersen vil eisini hava løgmálaráðharran at svara, nær lógin um yvirtøkuna av fjølmiðlaábyrgdini verður framd.

## Yvirtøku-lógin skal standa sína roynd

**YVIRTØKUR**
*Ingi Rasmussen*

Enn er yvirtøkulógin hjá løgmanni bert eitt uppskot.

18. februar skal hon standa sína roynd, tá føroysk og donsk embætisfólk fara at fundast um málið í Keypmannahavn.

Endamálið við lógini er at savna øll málsøkini, sum liggja uttan fyri heimastýrislógina, í eina og somu lóg. Sostatt verða øll málsøkini yvirtikin í einum, tá Fólkatingið samtykkir uppskotið.

Allir flokkar á løgtingi hava verið positivir mótvegis uppskotinum. Føroysku embætisfólkini, sum eru við á ferðini, eru úr løgmálaráðnum og løgmansskrivstovuni.

Dagin eftir verður fundur í Havn, har rættargangslógin er á skránni.

# Deyðarevsingin livir framvegis í Føroyum



*Ríkisumboðið hevur sent føroysku deyðarevsingina víðari. Men enn er onki frætt aftur úr Danmark, har verjumálaráðið viðger avtøkuna av hernaðarligu revsilógini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Deyðarevsing í krígstíð er framvegis galdandi í Føroyum. Hóast Løgtingið fyri langari tíð síðan hevur samtykt, at hernaðarliga revsilógin, sum inniheldur ásetingar um deyðarevsing í Føroyum, skal takast av, so 65 ára gamla lógin framvegis í øllum góðum**

**LÓGARSMÍÐ**
*Ingi Rasmussen*

Vesturheimurin er á gáttini til at fara í kríggj. Loypir NATO á Irak er Danmark og harvið eisini Føroyar óbeinleiðis partar av krígnum.

Tað setir føroyingar í eina margháttliga støðu. Ein gomul hernaðarlig revsilóg er nevniliga framvegis galdandi, og hon hevur við sær, at deyðarevsing kemur í gildi í Føroyum.

Talan er um lóg nr. 114 frá 7. mai 1937: »Militær straffelov«. Í grein 16 í lógini verður staðfest, at landsskaðiligt virksemi kann geva deyðadóm. Í grein 34 verður sagt, at »den, der tjener Fjenden som Spion straffes med livet«.

Í Danmark var lógin tikin av í 1973 og ein nýggj lóg sett í staðin. Men í Føroyum er lógin ongantíð broytt.

Sostatt er deyðarevsing enn galdandi í Føroyum hóast tað sjálvandi bert er á gulnaða pappírinum. Eitt undarligt tekin at senda út hjá eini tjóð, sum bæði sigur seg vera uttanveltað í ósemjum millum lond, og sum byggir á eina kristiliga og humanistiska siðvenju, ið vanvirðir deyðarevsing.

### Avtøka samtykt

Løgtingið samtykti tann 22. desember 2001 ríkislógartilmæli um at taka av hernaðaligu revsilógina fyri Føroyar, so at deyðarevsingin varð jarðað. Sostatt er málið avgreitt í Føroyum, men enn er ríkislógartilmælið ikki kunngjørt av donsku myndugleikunum. Deyðarevsing er sostatt framvegis í gildi Føroyum.

Ríkisumboðið hevur sent málið víðari til danska forsætismálaráðið. Steen Ryd Larsen, skrivstovustjóri í forsætismálaráðnum, sigur, at tey ikki eru partur av málinum, tí tað hoyrir til verjumálaráðið. Í verjumálaráðnum var rætti viðkomandi ikki at hitta, tá Sosialurin spurdi seg fyri.

### Ikki til at liva við

Orsøkin til, at deyðarevsingin aftur er komin upp at venda, er at løgtingið hósdagin viðgjørdi eitt uppskot um at góðkenna ein ískoytissátmálla til evropeiska sáttmálan um mannarættindi, sum fullkomiliga avtekur deyðarevsing.

Henni tóku allir tingmenn undir við, men so leingi hernaðarliga revsilógin ikki er tikin av í Føroyum, er deyðarevsingin kortini framvegis galdandi.

Á tingfundinum fóru løgtingsmenn tískil at umrøða hernaðarligu revsilógina, sum eftir øllum at døma er trupul at fáa lívið av.

– Tað hevur ikki verið óvanligt, at tað hevur tikið drúgva tíð at fingið ríkislógartilmæli staðfest, tá tey eru farin frá løgtinginum. Eg veit ikki, hví danskir myndugleikar ikki hava avgreitt málið enn, men eg haldi tað vera sera óheppið. Tí vit vita, at um kríggj brestir á, so fær hernaðarliga revsilógin gildi í Føroyum – og harvið eisini deyðarevsing. Og tað er ikki til at liva við, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, sum altso eisini fevna um deyðarevsing.

Løgmaður lovaði á tingfundinum hósdagin at taka málið upp við danska forsætisráðharran.

ítróttur
Nr. 27 • leygardagur • 8. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tríggir favorittar

**Hjá kvinnunum hava tey trý oddaliðini dystir móti teimum trimum niðaru liðunum um vikuskiftið, og hjá monnunum er spenningurin størstur í Klaksvík**

**FLOGBÓLTUR**
*Jákup Mørk*

Sum vant verða tríggir dystir leiktir í bestu kvinnudeildini um vikuskifti.

Hesa ferð tykist tað ikki vera orsøk til at rokna við teimum stóru broytingunum á stigatalvuni, sum úrslit av dystunum, tí í øllum trimum førum er talan um greiðar favorittar.

Á Kambsdali tjóvstartar ÍF vikuskiftið, tá tær taka ímóti Fleyr. Fleyr hevur ikki havt nakað serliga gott ár í ár, men seinastu vikurnar hava tær tó lyft seg eitt langt pettið frá niðurflytingarvandanum. Hóast hetta, so kann tó ikki roknast við, at tær fara at gera nakað við ÍF, sum í sínum lag stríðist fyri at halda seg í oddinum.

Har dystast tær í løtuni fyrst og fremst við Mjølnir, og tær hava sunnudagin heimavøll, tá Dráttur kemur á vtijan. Dráttur er uttan iva tað sterkasta av teimum trimum niðastu liðunum, men yvir høvur hava teirra avrik verið ov óstøðug til veruliga at hótta ovaru liðini, og sum Mjølnir spælir í løtuni, er ilt ímynda sær, at vágakvinnurnar skulu gera nakað sum helst við oddaliðið.

Seinasti dysturin verður í Hoyvíkarhøllini, har TB kemur á vitjan. Hjá KÍF tykist tað nú mest sum at spælið í bestu deildini er av á hesum sinni. Og tær skulu í øllum førum ikki gera sær tær heilt stóru vónirnar um stig í hesum dystinum. Tó kann teirra møguleiki vera, um TB nú hevur gloymt alt um FM, og ístaðin hugsar um steypafinaluna um eina viku, men hinvegin er ilt at ímynda sær, at munurin millum liðini ikki fer at koma greitt til sjóndar.

### Spenningur í Klaksvik

Hjá monnunum er støðan kanska ikki heilt so greið við favorittleiklutunum.

Tó er einki at ivast í, at ÍF er risa-favorittur, tá teir taka ímóti Fleyr á Kambsdali. ÍF hevur annars eftir tíggju sigrar á rað brádliga tapt tveir dystir, men móti Fleyr er mest sum óhugsandi, at fuglfirðingarnir skulu gera nakað sum helst.

Tað er kanska eisini óhugsandi, at sørvingar skulu gera nakað við Mjølnir, sum nú tykist vera komið rættiliga ígongd. SÍ hevur sýnt sera óstøðug avrik seinastu tíðina, men fyri viku síðani gekk tað rætta vegin, tá teir vundu burtur úr Fram.

Sum nevnt, so hevur Mjølnir tó fingið veruliga ferð á nú. Oddasessurin, sum annars hevur verið fjarður alt kappingarárið, er nú brádliga í eygsjón, og so tykist tað í øllum førum skilaleyst, um teir nú fara at tveita nøkur stig burtur.



*Av teimum fimm flogbóltsdystunum um vikuskiftið, tykist størsti spenningurin vera í Klaksvík, tó at Mjølnir eru greiðir favorittar, tá SÍ kemur á vitjan*

